# Bilar

**Magnus Gunnarsson**
*maggi@sosialurin.fo*





*Magnus Magnussen frá elbilabólkinum hjá SEV við elbilinum Tesla Roadster Sport 2.5*

# TESLA elbilurin komin

Við Norrönu í morgun kom ein Tesla Roadster, sum er komin til landið í samband við ráðstevnuna um elbilar, sum verður í Norðurlandahúsinum í morgin.

Talan er um ein Tesla Roadster Sport 2.5, ið er ein sera kvikur elektriskur sportbilur, sum koyrir frá 0-100 km/t upp á 3,7 sekund.

Elmotorurin við 288 hk (56 kwh) verður drivin av lithium-ion battarium. Toppferðin er umleið 200 km/t, og bilurin koyrir 340 kilometrar upp á eina løðing.

Tesla Roadster Sport 2.5 er ein sportbilur til tveir persónar og vigar 1.200 kg. Løðitíðin er 3,5 tímar við 63A. Bilurin, sum er framleiddur av Tesla Motors í Kaliforniska, kom fyrstu ferð á marknaðin í 2008. Í Danmark kostar ein Tesla Roadster úr 800.000 krónum, men hesin í Sport 2.5 útgávuni kostar 930.000 krónur á donskum nummarplátum.

*mg*





*Hesin Tesla Roadster er ein 2-persóna sportbilur við 288 hk og kostar næstan eina millión krónur*

**Hósdagin 17. februar kl. 16.10**

Í sendingini verður vitjað á elbilaráðstevnuni í Norðurlandahúsinum týsdagin 15. februar. Samrøður verða við fundarluttakarar og við umboð fyri Sev og Jarðfeingi.

Eisini verður samrøða við Anthonius Dalsgaard og Heðin Weihe frá Auto Service um elbilin Peugeot Partner Van Electric, eins og ein Tesla Roadster verður royndarkoyrdur saman við Magnusi Magnussen frá elbilabólkinum hjá SEV.



**Magnus Magnussen**



**Heðin Weihe**



**Anthonius Dalsgaard**

Vinnu- & bilradio á Rás 2